# OUTLET 2010

## 23. & 24. oktober 2010 í Ítróttarhøllini á Hálsi

# NÚ SKAL LAGRIÐ RUDDAST...

Hevur lagrið breitt seg uppá ovastaloft, í kjallaran og enntá eisini inn í garaguna, so er eitt at gera - tryggja tær eitt øki á OUTLET 2010!

**50%**

SUPER SUMMARTILBOÐ
sí á baksíðuni.

Synergi

Synergi - Tvørgøta 13 - 100 Tórshavn - www.synergi.fo - synergi@synergi.fo - 322355 - 222355 - 227464

# Vælkomin at tøma lagrið á Outlet 2010



## Leygardagin 23. oktober & sunnudagin 24. oktober 2010

Í døgunum leygardagin 23. og sunnudagin 24. oktober 2010 verður stór og fjølbroytt OUTLET stevna í Høllini á Hálsi í Havn. Stevnan er fyri bæði detailhandlar og heilsølur, sum fáa eitt gott høvi at selja sítt restlagur o.líkn. beinleiðis til brúkaran.

## Lagrið stjelur pláss, pengar og orku



Tit hava kanska ofta tosað um at fáa ruddað út í lagrinum, sum er fult av gomlum, men góðum vørum, sum stjala alt ov nógv pláss, pengar og orku. Kanska er tað so fult, at tit í veruleikanum ikki ána, hvat fjalir seg, hvørki ovast, niðast ella innast.

## Kjallarin fullur og loftið proppfult

Eigur tú sjálv/ur fyritøkuna, er tað kanska so galið, at lagrið hevur breitt seg til títt egna loft, kjallara, garaguna og nú umhugsar tú at biðja um pláss hjá foreldrum og vinfólki.



## Fantastisk kensla

Tað kann helst kennast møtimikið at rudda út, áðrenn man er farin í gongd, men roynið tað, kenslan aftaná verður fantastisk:-).

## Alt millum himmal og jørð

Miðað verður ímóti at hava eitt breitt vøruúrval, eitt nú klæðir, skógvar, brúksting, bøkur, el-lutir, møblar, sjónvørp, amboð, kosmetikk, smykkur, matvørur, gávulutir, leikur, tónleik, máling o.m.a.



## Endamálið við stevnuni

Endamálið við OUTLET 2010 er at detailhandlar og heilsølur fáa rættiligt høvi at rudda út á lagrinum og harvið fáa meiri pláss, pening og orku. Harumframt høvi at gera vart við seg á ein annarleiðis hátt. Viðskiftafólkini fáa eitt super høvi at gera eitt rættiligt kvetti. Tað kann av røttum kallast ein vinn-vinn støða, ikki so ;-)



## Marknaðarføring

OUTLET 2010 verður væl og virðiliga marknaðarførd. Málið er, at flestu føroyingar, ið hava áhuga fyri slíkari stevnu, eru varugir við og ynskja at vitja OUTLET 2010.







# Vælkomin at tøma lagrið á Outlet 2010



## Økini seld eftir "først til mølle"

Økini verða seld eftir "først til mølle" prinsippinum, so tað ræður um at gera skjótt av. Tá tú skrásetir teg, verður tú biðin um at raðfesta 3 ymisk øki, hetta tí økið kann verða selt, uttan at síðan við tekningini er dagførd.



## Kostnaður

EINANS kr. 3.500 + MVG pr. øki. (kr. 4.375 v/MVG). Stødd av øki: 6m2. Um tvær fyritøkur ynskja at deilast um eitt øki, er hetta møguligt. Tá kemur eitt eyka gjald á kr. 500 fyri hvørja eyka fyritøku uppá kostnaðin.

## TILBOÐ

- keypa tit øki áðrenn 28. juni, hava vit eitt heilt serligt summartilboð. Sí aftastu síðu undir praktiskt.

## Stevnan er opin

OUTLET 2010 verður opin

- Leygardagin 23. oktober kl. 10.00 - 20.00
- Sunnudagin 24. oktober kl. 14.00 - 20.00

Høllin fer at bera brá av sonnum OUTLET stemningi við rættari rokan í fjøruni:-).

## Sera bíligt at luttaka

Kostnaðurin fyri eitt øki á OUTLET 2010 er væl bíligari, enn vit kenna tað frá tílíkum stevnum, hetta m.a. tí tað ikki eru eins nógvar útreiðslur til eitt nú básaveggir, spots, pallar, framførslur o.a.

Økini eru deild upp í øki á 6m2 hvørt. Møguleiki er hjá fyritøkunum at seta tvey ella fleiri øki saman til eitt. Um so er, skal hetta viðmerkjast í tilmeldingini.



## Íroknað

Íroknað kostnaðin fyri eitt øki er m.a. skráseting, umsiting, reingerð áðrenn og aftaná, ávíst tal av starvsfólki, eitt borð, ein stólur og marknaðarføring av stevnuni.

Møguleiki er fyri fleiri stólum og borðum, tó er avmarkað tal av hesum. Møguleiki er eisini fyri tráðleysum interneti. Innrætting og útgerð annars er ikki íroknað prísin fyri økið.

Installatiónir so sum el til t.d. elektriskar vørur/útgerð er ikki íroknað, men kann bíleggjast hjá fyriskiparunum.

Tá
ja



# Tað praktiska

| | |
|---|---|
| **Dagur:** | 23. oktober 2010 - 10.00-20.00<br>24. oktober 2010 - 14.00-20.00 |
| **Staður:** | Ítróttarhøllin á Hálsi |
| **Kostnaður:** | kr. 3.500 + mvg. /øki á $6m^2$ |
| **Summar-tilboð:** | Keyp øki áðrenn 28. juni og fá 2 øki, men rinda bert fyri tað eina. Ella spar 15,7 % - keyp eitt øki á $6m^2$ fyri einans kr. 2.995 + mvg. |
| **Tilmelding:** | á www.synergi.fo |
| **Freist:** | 20. september 2010<br>- ella so leingi pláss er eftir |
| **Treytir:** | Aftaná tilmelding ber ikki til at melda frá, men tað ber tó til at lata økið til aðra fyritøku. |

Fyrivarni verður tikið fyri prent-villum og møguligum broytingum í skránni.

Hesin faldari er ein svanamerk-tur prentlutur.

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

Synergi

Synergi - Tvørgøta 13 - 100 Tórshavn - www.synergi.fo - synergi@synergi.fo - Tel. 322355 - 222355 - 227464